# Teitur er ársins sangari í Danmark

**Á stóra Danish Music Awards tiltakinum gjørdist Teitur vinnari av heiðrinum besti danski sangari, ein heiður, ið má metast at vera tann fremsti heiður, ið ein sangari kann fáa í Danmark.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Danish Music Awards varð leygarkvøldið hildið í KB-Høllini á Vesterbro í Keypmannahavn, gallatiltakið varð sent beinleiðis á DR og føroyska Sjónvarpinum. Fimm av heiðurslønunum, ið vórðu handaðar hetta kvøldið komu á føroyskar hendir ella í øllum førum nøkkso føroyskar hendur. Teitur gjørdi tað, ið hann ikki megnaði á Planet Awards, at vinna heiðurin sum besti sangari, meðan fjóðrings gøtumaðurin Simon Kvamm og hansara bólkur fekk fýra heiðurslønir.

Tað var ikki óvæntað, at Nephew fekk fleiri heiðurslønir. Bólkurin var tann bólkurin, ið var í uppskotið til flestar heiðurslønir heili seks, og árið 2006 hevur verið stórt fyri bólkin, við fløguútgávu, hittlista dominansi og nógvum og væleydnaðum konsertum. Meira óvæntað var, at Teitur gjørdist ársins danski sangari. Hann vann frammanfyri stórfavorittinum Simon Kvamm, sangaranum í Veto Troels Abrahamsen, Thomas Helmig og Mikael Simpson. Hetta er ivaleyst størsti heiður, ið ein sangari kann fáa í Danmark.

Teitur er í USA á konsertferð í løtuni og fekk tí ikki verið har, tá heiðurslønin varð handa. Røðan var bandað frammanundan, og hon varð hildin á føroyskum. Teitur tók ímóti DR í myrkamorreyðari troyggju í hugnaligu summarhúsinum hjá Bloch familjuni í Tisvilleleje, har Teitur tók sína føroyskt mæltu fløgu upp. Hann segði m.a. 1000 takk fyri, hann helt heiðurslønina vera fína, og at hon líktist einum tjaldri.

Verturin helt tað vera stuttligt við einum so perudonskum sangara sum vinnara, men gleddist um, at stóru upphæddirnar, ið danir hava sent til Føroyar nú verða brúktar til okkurt gott. Væntandi sita eitt stað ímillum 1 og 2 milliónir áskoðarar frammanfyri skíggjan, og fylgja við, so talan er um veruliga gott PR fyri føroyska sangaran.

Tað vóru hjúnini Johan Wohlert og Pernille Rosendahl, ið handaðu heiðurslønina, Pernille nýtti høvi at vísa sín stuðul til tey ungu, ið berjast við løgregluna í Keypmannahavn í løtuni, hetta gav ikki Pernillu nakran stuðul millum nógvu áskoðararnar, men áðrenn løtan gjørdist ordiliga pínlig, tók Jóhan Wohlert orðið og skifti evni.



## Kjak:

**Á heimasíðuni hjá DR er lívligt kjak um DMA og eitt av evnunum, ið fyllur nógv er sigurin hjá føroyska Teiti, vit hava funnið nøkur klipp úr kjakinum:**

**Lasse skrivar:**
*"Det var også fortjent at Teitur vandt, han er ny, og absolut en man skal holde øje med. Han er på vej frem her hjemme, men er rigtig stort i udlandet, også er det også et godt signal at sende, til færøerne, som trods alt, stadig er en del af DK."*

**Maria skrivar:**
*"Skøøønt at Teitur vandt, virkelig en overraskelse; han er ikke bare en dygtig sanger men også en formidabel sangskriver! Det var virkelig fortjent!"*

**Cecilie skrivar:**
*"Personligt er jeg glad for at Teitur vandt for årets danske sanger(og at han takkede på færøsk)"*

**Hmm skrivar:**
*" Han(Teitur) burde også været nomineret og vundet årets album og sangskriver. Lige et til mikdik Teitur er færing ligesom Simon Kvamm er ½ færing."*

**HM skrivar:**
*"Eg elski teg Teitur<3"*

**Kragen skrivar:**
*"Fik et mindre chock da Teitur vandt foran Simon og Mikael, og ikke mindst ham fra Veto (navnet kan jeg ikke lige huske). Men blev positivt overrasket. Det var da godt til ham."*

**Blunt-fan skrivar:**
*Det er mega fedt at Teitur vandt, helt klart årets bedste sanger.... og mega fed cd, han skulle have været nomineret i nogle flere priser(og have vundet dem)...Og nårrhhh han var så søøød da han skulle snakke dansk!!! Er der nogen der har hørt "Syner" fra cd'en "andersens drømme" hvor han forsøger sig på dansk, nårhhhh!!!!"*

**He skrivar:**
*"Teitur tú rular. Nú hevur tú bara prógva at vit føroyingar eru betri enn danir :)"*

**Rasmus Sørensen skrivar:**
*"Jeg synes det eneste dårlige ved showet var, at Teitur vandt fordi at dansk musik er ved at udvikle sig og synes klart at de andre havde fortjent den. Hvordan kunne den hemmelige jury vælge ham. Det er pinligt (...) Simon Kvamm kunne godt få prisen som Årets Danske Sanger det jeg meget enig i, for det er Danmarks bedste navn, vi har nu"*

**Mikdik skrivar:**
*"Jeg synes de lorte islændinge og Teitur og det hele skal skride, det var ikke Teitur han vandt et eller andet årets danske han er islænding."*

**Jesper S. skrivar:**
*"Lidt mærkeligt/sjovt, at Teitur vinder for bedste DANSKE sanger, men selv om man kan diskutere om han er dansk eller ej, så kan man ikke sætte spørgsmåltegn ved hans evner som musiker/sanger :)"*

**HH skrivar:**
*"Tillykke TEITUR flott klaret!"*

## *Ársins vinnarar*

**Ársins danska hitt:** Nephew - Igen og Igen og (Copenhagen Records). Valgt ved afstemning af P3s lyttere.
**Ársins danska fløga:** Nephew - Interkom Kom Ind (Copenhagen Records)
**Ársins danski bólkur:** Nephew - Interkom Kom Ind (Copenhagen Records)
**Ársins danska songkvinna:** Kira Skov (Kira & The Kindred Spirits: Kira & The Kindred Spirits, Copenhagen Records)
**Ársins danski sangari:** Teitur Lassen (Teitur: Stay Under The Stars, Playground Music)
**Ársins nýggja danska navn:** Veto - There's A Beat In All Machines (Playground Music)
**Ársins danska rokkútgáva:** Nephew - Interkom Kom Ind (Copenhagen Records)
**Ársins danska poppútgáva:** Peter Sommer - Destruktive Vokaler (SonyBMG)
**Ársins danska elektronikaútgáva:** Trentemøller - The Last Resort (A:Larm)
**Ársins danska Hipp Hopp útgáva:** Johnson - Det Passer (ArtPeople)
**Ársins danska barnaútgáva:** Diverse Kunstnere - Der var engang en dreng (Copenhagen Records)
**Ársins danski sangskrivari:** Mikael Simpson - Stille & Uroligt (A:Larm)
**Ársins danski tónleikaframleiðari:** Trentemøller (Trentemøller: The Last Resort, A:Larm)
**Ársins danska sjónbandalag:** Veto - We Are Not Your Friends (Instruktør: Peder Pedersen, Producent: M2 Film, Playground)
**Ársins útlendska útgáva:** Justin Timberlake - Futuresex/Lovesounds (SonyBMG)
**Ársins nýggja útlendska navn:** Gnarls Barkley - St. Elsewhere (Warner Music)
**Heiðursprísurin hjá IFPI:** Røde Mor

